33 spøkilsissøgur komu inn

Kappingin hjá Bókadeild Føroya Lærarafelags at skriva spøkilsissøgu hevur fingið sera góða undirtøku

RITHØVUNDAKAPPING
tíðindaskriv

Ikki færri enn 33 spøkilsissøgur vóru komnar inn, tá freistin var úti síðsta fríggjamorgun. Seinni í mánaðinum verður greitt, hvørji tvey handrit verða vald burturúr. Vinnandi søgurnar skulu vera við í stórari norðurlendskari bókarútgávu við nýggjum spøkilsissøgum, sum hava støði í gamlari frásøgumentan. Í savninum verða átta norðurlendsk forløg umboðað við einari ella tveimum søgum hvørt. Grundin til, at evnið er spøkilsissøga, er, at hetta tekstslagið er nógv uppi í tíðini, og øll norðurlond hava drúgva siðvenju at siga frá spøkilsissøgum.

Ætlanin er, at allir høvundarnir skulu hittast til eitt vikuskiftisskeið í Reykjavík saman við forleggjarum og fakfólki, har søgurnar verða viðgjørdar og betraðar. Á einum slíkum skeiði hava høvundarnir høvi at hoyra fakfólk siga frá um hetta tekstslagið og hvat krevst fyri at gera eina søgu góða. Allar søgurnar verða eftirmettar og betraðar í samskifti millum høvundar og forlagsfólk.

Listafólk úr ymisku londunum fara at myndprýða søgurnar við litmyndum, og bókin kemur út í øllum londunum samstundis á heysti 2006.

Enn er ikki greitt, hvussu søgurnar eru, men tað er ikki óhugsandi, at ein bók aftrat spyrst burtur úr kappingini. Eitt savn við nøkrum av teimum søgunum, ið ikki koma við í stóra norðurlendska savnið.

Bókadeild Føroya Lærarafelags letur eina ella tvær virðisløn á kr. 7.500, men tilskilar sær eisini rætt til onga virðisløn at lata, um ikki verður hildið, at nøkur søga er virðislønarverð. Bókmentaliga nevnd Føroya Lærarafelags er dómsnevnd.

Fara at bora tunnil ímillum Øravík og Hov í september



Kortið vísur, hvar Hovstunnilin verður boraður. Svørtu strikurnar eru vegirnir, ið skulu gerast og brotna strikan er sjálvur tunnilin. Øravíkarmegin verður innslagið til tunnilin í Tjaldarvíksbrekkum og Hovsmegin verður tað undir hamarinum við Torvsheygg, tað er einar 200 metrar í ein útnyrðing úr har landsvegurin fer um Hovsá

Nú verður síðsta hond løgd á fyrireikingarnar til at gera tunnilin ímillum Øravík og Hov. Arbeiðið verður boðið út í vár og í september verður klárt at bora

HOVSTUNNIL
Áki Bertholdsen, aki@sosialurin.fo

Í september byrjar arbeiðið at bora tunnilin ímillum Øravík og Hov.

Nú verður síðsta hond løgd á fyrireikingarnar í sambandi við arbeiðið og Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í vinnumálum, sigur, at arbeiðið skal bjóðast út og tað verður tað í vár.

Fyrst í juli verður klárt at rigga arbeiðsplássið til og at grava omanav og fyrst í september verður so klárt at fara undir sjálvt boriarbeiðið.

Landsstýrið hevði ætlanina um tunnil ímillum Øravík og Hov til viðgerðar týsdagin og tilfarið er nú sent politisku flokkunum til hoyringar.

Bjarni Djurholm væntar, at ein verklagslóg verður løgd fyri løgtingið um einar 14 dagar. Tað er ein lóg, har løgtingið gevur landsstýrismanninum heimild at fara undir verkætlanina innanfyri ávísar karmar.

Hann sigur, at í verklagslógini fer hann at biðja løgtingið um heimild til at brúka upp til 150 milliónir krónur til tunnilsarbeiðið og vegagerð í sambandi við tunnilin.

Tá ið hann hevur fingið hesa heimildina frá løgtinginum, kann hann sostatt gera avtalur í sambandi við arbeiðið.

Tað fer at taka tvey ár at gera tunnilin og hann verður sostatt liðugur í 2007.

Verður 2437 metrar langur

Á fíggjarlógini í ár eru 31 milliónir settar av til arbeiðið. Fer tunnilin at kosta 150 milliónir, verður neyðugt at seta 75 milliónir av til Hovstunnilin. Í 2007 verður sostatt neyðugt at seta 44 milliónir av. Verður tunnilin bíligari, minka játtanirnar tilsvarandi, men tað stóra takið verður í øllum førum á fíggjarlógini fyri 2006.

Forprojektið til tunnilin og vegirnar er gjørt. Tilsamans verður tunnilin 2437 metrar langur og harafturat skulu 2240 metrar av vegi gerast av nýggjum ella broytast. Sostatt er fevnir verkætlanin um 4677 metrar av tunli og vegum tilsamans.

Í Øravík verður innslagið til tunnilin í Tjaldarvíksbrekkum, og Hovsmegin verður tað undir hamarinum við Torvsheygg, tað eru einar 200 metrar í ein útnyrðing úr har landsvegurin fer um Hovsá.

Tunnilin er ein "T 9,5 tunnil". Í neðra er tunnilin 9,5 metrar breiður og koyribreytin er 7 metrar. Atkomuvegirnir eru 7 metrar breiðir við 1,25 metra breiðari vegøksl á hvørjumegin. Hovsmegin kemur vegurin í einar 450 metrar frá munnanum.

Kortini kunnu smá frávik gerast í ætlanini, verður tað mett at verða skilagott.

Bjarni Djurholm sigur, at tað fer at kosta nakað av pengum at røkja nýggja tunnilin, men afturfyri verða útreiðslur spardar til vegin sum nú er.

Tilsamans verður talan um ein eyka kostnað upp á einar 200.000 krónur um árið. Neyðugt verður sostatt hækka játtanina til Landsverk 200.000 krónur, røktin av landsvegakervinum annars ikki skal versna.

Hnvegin væntar landsstýrismaðurin, at fíggjarliga fer tunnilin at hava góða ávirkan á kommunurnar í Suðuroy, tí at hann fer at føra til meiri virksemi í oynni. Somuleiðis fer tunnilin at hava góða ávirkan vinnuna í Suðuroy.

Samstundis verður tunnilin ein bati fyri umhvørvið, tí teinurin at koyra verður eitt sindur styttri. Harafturat liggur tunnilin væl lægri enn vegurin, sum nú er og tí fer nýtslan av brennievni at minka nakað.

Og landsstýrismaðurin væntar eisini, at hann verður ein bati fyri ferðslutrygdina.

Tikið fleiri ár

Sostatt hevur tað tikið fleiri ár frá tí at ætlanin um at gera tunnil ímillum Øravík og Hov kom í eygað, til nú, tunnilin verður boðin út.

Tað var longu í seinnu helvt av nítiárunum, at jarðfrøðiligar kanningar vórðu gjørdar í økinum, eisini royndarboyringar og seismiskar kanningar.

Útfrá tí var ein farleiðin funnin, har tað var frægast at leggja tunnilin.

Í 2001-2002 vórðu tunnil og vegateinar báðumegin við projekterað, og ætlanin var at gera inntøkini í 2002, men hetta varð av ongum.

Her var talan um ein tunnil sum liggur væl longri uppi í hæddunum enn tunnilin, sum nú skal gerast.

Men áðrenn gongd kom á arbeiðið aftur í 2003, varð tankin reistur um eina nýggja linjuføring væl lægri í lendinum, men tað er í einum lendi, sum jarðfrøðiliga er trupult.

Og av tí at henda linjuføring samfelagsliga og ferðslutekniskt liggur betri og av tí at tøknin er nógv ment, varð avgjørt at kanna nýggju linjuføringina í samstarvi við jarðfrøðingar og aðrar ráðgevarar.

Neyðugar forkanningar og metingar vórðu gjørdar í nýggja økinum í 2004, og úrslitið er so tann linjuføringin, sum tunnilin nú skal gerast eftir heilt niðri í láglendinum, so at vit sleppa undan eini drúgvari brekku, sum mangan er ótespulig um veturin, tá ið kavi og ísur er á vegnum.

– Av tí at lendið niðri í láglendinum er so trupult, haldi eg, at tað var rætt at brúka tað neyðugu tíðina til at fyrireika arbeiðið tí tað var ein ávísur váði knýttur at einum tunli her. Men nú vit fara undir tunnilin, halda vit, at vit standa á so tryggari grund, sum tilber, sigur Bjarni Djurholm.

– Hetta er at hetta skuldi verðið ein stórur fyrimunur fyri Suðuroy tí tað fer at gera tað nógv styttri ímillum syðru- og norðaru helvt í oynni, leggur hann afturat.